

Geir Helgesen er Asiagranskari og spyr í fyrlestri sínum: Eru vit á veg inn í eina nýggja heimsskipan?

# Vit og Asia - eru vit á veg inn í eina nýggja heimsskipan

**Jan Müller**

22.09.2015 - 15:41

Oljan.fo

Norðurlandahúsið og Fróðskaparsetur Føroya hava gjørt eitt nýtt samstarv um at skipa fyri almennum fyrilestrum, ið viðgera akademisk evni. Ætlanin er at fáa granskarar og aðrar serfrøðingar at kunna um ymisk tíðarhóskandi og viðkomandi evni. Geir Helgesen er Asiagranskari og spyr í fyrlestri sínum: Eru vit á veg inn í eina nýggja heimsskipan?

Byrjað verður í kvøld kl. 19.30 við fyrilestri hjá Geir Helgesen. Geir Helgesen er Asiagranskari og spyr í fyrlestri sínum: Eru vit á veg inn í eina nýggja heimsskipan? Kina, Korea og Japan eru áhugað í Arktis og harvið í okkara parti av heiminum. Bræðingin av ísinum, atgongd til nýggjar siglingarleiðir, nýggj ráevni, fisk og eina órørda náttúru draga fíggjarligu risarnar úr Asiu og eisini nógv av fólkinum úr hesum fjølbygda heimsparti, sum mennist skjótt.

Fyrilestrarøðin heldur fram uml. einaferð um mánaðin til mai 2016.

Ókeypis atgongd